# Runavíkar havn á cruise-messu í Miami

**Síðan Jón Nónklett tók við sum havnastjóri við Runavíkar havn, hevur hann einaferð luttikið á stóru cruise-messuni í Miami í Florida, har føroyingar og grønlendingar hava felags bás.**
**– Hetta er ein sera stór og áhugaverd messa, sum er vorðin partur av okkara marknaðarføring av havnini, sigur hann**



*Cruise-vinna er vorðin ein partur av býarmyndini í Runavík á hásumri*

At vera havnastjóri hjá Runavíkar havn fevnir um meira enn bara at binda og loysa skip og hava skil á pappírsarbeiði.

Eitt úrslit av tí marknaðarføringsarbeiði, sum eisini er partur av hesum starvi, er, at fleiri og fleiri ferðamannaskip vitja á Skálafjørðinum, sum vit kunnu lesa um í hinari greinini á hesi opnu.

### Seatrade í Miami

Ein av teimum stóru messunum kring um heimin, sum serliga leggja dent á cruise-ferðir, er Seatrade messan í Miami í Florida, sum verður hildin á hvørjum vári.

- Síðan eg tók við hesum starvi, havi eg einaferð luttikið á Seatrade. Hetta var í vár. Seatrade man vera ein av heimsins størstu messum við denti á ferðamannavinnu um heimshøv.

Jón sigur, at føroyingar og grønlendingar plaga at vera saman á felags bási í Miami, tí mett verður, at hetta gevur londunum betri møguleikar at síggjast á messuni.

- Sum eg havi skilt, hava føroyingar luttikið á hesi messu í eini 15 ár.

Á Seatrade er cruise-vinnan um allan heim rættiliga væl umboðað, og her eru soleiðis góðir møguleikar at vísa fram teir møguleikar, ymisku londini og havnirnar hava at bjóða skipum og ferðandi.

- Á eini slíkari messu eru nógvir nationalitetir, og okkara uppgáva er at kunna um teir møguleikar, vit hava at bjóða ferðamannaskipum og teimum, sum við eru. Hetta gera vit við faldarum og annars við beinleiðis samskifti við keyparar, seljarar og vitjandi á messuni, sigur Jón Nónklett.

### Aðrir møguleikar

Havnastjórin sigur, at tað eru eisini aðrar messur av slíkum slagi, og eitt nú veit hann at siga, at ein seatrade-messa eisini er í Venedig í Italiu í desember.

- Mær vitandi hava føroyingar ongan bás á hesu messu, leggur hann aftrat.

Jón Nónklett sigur, at onkur tiltøk og ráðstevnur um sjóvegis ferðamannavinnu verða á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn í næstum.

Av teimum seks ferðamannaskipunum, sum vitjaðu á Skálafjørðinum í summar, var hitt seinasta 12. august.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Havnaskrivstovan í Runavík luttekur á Seatrade í Miami, haðani hendan myndin er*

Fríggjakvøld
24. oktober. Børn til og við 12 ár ÓKEYPIS atgongd, saman við einum vaksnum!
Countrykonsert kl. 19:30.
Kostnaður 195,- (galdandi fyri alt kvøldið)
Magni Christiansen
Theodor Petersen
Rockkonsert kl. 22:00.
Kostnaður 125,-
T.O.S. The Last Breath
Credo
Mega gospel kvøld



Leygarkvøld
25. oktober frá kl. 24.00 til kl. 04.00. Atgongumerki á 180 kr. fáast við dyrnar!
Feitt dansikvøld!
Fá fatur á vinunum og kom í býin í Runavík í Mentanarvikuni
Jens Marni við Faktor 4
Eyðun & Terji



Sunnudag
26. okt. kl. 17.00. Atgongumerki á 100 kr. fáast við dyrnar 1 tíma áðrenn!
Børn undir 2 ár ókeypis atgongd
Vertir: Lív Reinert Kjeld og Eir í Ólavstovu
Ársins barna- & ungdómstiltak
FAROE 5 • Dansigenturnar Katrin & Diana •
Lars Lottrup - Ballónmaður & eitthjólssúkklari •
Bassi við onkrum góðum til børnini



Tiltøk í ítróttarhøllini í Runavík
Eik
FAROEXPO
KREA
MENTANARVIKA Í RUNAVÍK